Vikuskiftis Sosialurin



# Páll á Reynatúgvu og trúðvirðið

HANS HANSEN

Ja nú kundi eg ikki haldi meg frá penninum. Føldi at eg má gera mína samfelags skyldu at upplýsa borgaranum her á landi, at tað, ið maðurin fortelur okkum er ein fúl og loddrøtt lygn.

Tað ið fangaði mín áhuga, var lýsing á Rás2 hvar ið Páll á Reynatúgvu fortelur okkum veljarum og borgarum her á landi, at " Skapar vinnan trivnaðin, skapa vit karmarnar"

Javel, eg meini tað.. síðst vit stóðu við síðulinjuna og eygleiddu henda og sama mann, var tá ið í hann í villasta Vinnie Jones stíl blakaði seg í villari glíðandi takling, og sorlaði trivnað og karmar í síni egnu heimbygd. Hansara síðsta "stunt" var tá ið avreiddi størsta byggiarbeiði í nýggjari tíð úr Sandsbygd. Gott fyri trivnaðin? Neyvan.

Bygdin heima á Sandi er ógvuliga skerd fyri vinnulív, og so skuldi ein sjálvandi ynskt og vóna, at mann eigur at skapa bestu og tryggastu karmar, eisini her stendur trúvirðið hjá honum ikki mát. Uttan samtykt frá Sands kommunu og uttan, at bjóðað arbeiði alment út gav hann ordrar, um at ríva niður vinnubygningin har timburhandilin Sand húsaðist. Leigarin fekk órímiliga og vánaligastu virðing frá Páll á Reynatúgvu. Hetta elvdi til at timburhandilin nú drívur sítt virksemið í Skopun.

Tað er ikki neyðugt at nevna fleiri dømið her og nú. Tað skal verða mín inniliga áheitan til allar borgarar her á landi um ikki at seta sín kross við slíkan ørskap, og heldur ikki kann eg mæla nøkrum til at seta kross við tjóðveldið.

# Hey bygdarfólk í Havn! Hjálpið bygdarfólki tykkara at fáa umboð á ting

JÁKUP SUNI LAURITSEN
Sørvágur



Løgtingsvalið 19. januar verður ein sonn PISA-roynd fyri okkara fólkaræði. Verða pisurnar á bygd mentar at fara á flog, og lenda tær trygt í løgtingssessi?

Eftir valdagin koma vit av sonnum at síggja, hvørjar avleiðingarnar kunnu verða fyri útjaðaran og borgararnar har, nú Føroyar, eftir ódámliga politiska viðger, gjørdust eitt valdømi.

Altíð beinrakni Jógvan E. Ósá, hevur við serligum hegni skrivað tvey lesarabrøv, har hann skrivar um nýggju skipanina, og roynir at fáa veljaran at skilja, hvussu gáloysin ella naiv og ótaktisk uppstillingin fyri útjaðaran er. Klaksvíkingarnir báðir Jógvan E. Ó. og John William Joensen hava roynt at víst á ymsar trupulleikar.

Kortini hava floksleiðslurnar fyri nakrar flokkar kveistrað bygdarfólkini til viks og givið kontra boð ímóti ynskjum frá lokalfeløgunum. Ikki er óhugsandi, at slíkt ger, at lokali politiski áhugin fánar. Eldhugurin minkar, arbeiðið fer kanska at tykjast nyttulest, tí fjarstøðan, hjá lokalu feløgunum til ávirkan, verður ov long. Helst sovna, sum frá líður, nøkur av politisku lokalfeløgunum.

Áðrenn málið um Føroyar sum eitt valdømi var skundað ígjøgnum á Løgtingi, stóðu floksformenn kropp á kroppi á løgtingsins røðarapalli og lovaðu lokalu valfeløgunum sín stuðul at halda fram við virksemi teirra. Hetta vóru bert tóm orð. Summir flokkar hava enntá ikki so mikið sum givið pláss fyri einum tí einasta stillara frá onkrum av teimum gomlu størru valdømunum. Hvat hava vit í væntu? Gevur hetta okkum vón um at verða hoyrd?

**Áheitan**

Bygdarfólk í Suðurstreymoy: Veljið uttan fyri kommunumark!

Fyrrverandi løgtingsformaðurin, skilamaðurin av Toftum, skrivaði herfyri, at vanligt var at kasta snørið, har nógvur fiskur var at fáa.

Soleiðis er eisini við stemmufiskarii. Valevnini á bygd eiga at ýta væl av, kasta dúgliga og heinta á øllum miðum í Suðurstreymoy.

Eg fari at heita á øll bygdarfólk í Havn um at vísa sín fullan stuðul til bygdarfólk sítt. Av bygd fáa við skilafólk á løgting. Hava vit ikki hesi at tosa mál okkara á Føroya Løgtingi, ja, so hava vit ongan!

Standið saman við okkum um at velja umboð okkara á ting. Tað sakar als einki, um vit, uttan fyri Havnina, eru eitt sindur taktisk.

# Fleiri orsøkir til ES-varsemi

JÓNAS JOHNSSON



Anders Fogh, státsministarin, var herfyri í Lissabon og váttadi nýggja stjórnarskipan. Men á teldu útróðri sást, at nýggja ES-stjórnarskipanin bara er tann vrakaða grundlógin í øðrum hami. TV vísti illan mann, sum vil stevna Anders Fogh Rasmussen fyri hesa níðinsgerðina ímóti danska fólkinum!

Juristar hava ruddað uppskotið fyri grundlógsorð, og síðan doypt tað at eita stjórnarskipan. Ljóðar tað familiert? Tyngdin er óbroytt grundlóg. Tað prógvar nýggja skipanin, at velja forseta. Nú skifta ES-formenn hvørt ½ ár millum stjórnarleiðarar. Men í heyst skal fyrsti ES-forseti kjósast fyri 3½ ár. Og sjálvandi fær valdur forseti øgiliga økt vald, og limalondini tess minni. Evropasøga gloymd? Nú er vágin størri fyri at marionettur gerst forseti. Um td. pávin orðnar katolikkunum okkurt, so skulu teir altíð akta hesum "Vicarius Christi". Meirilutin ræður, og tað tráðnýtir pávin til sína dagskrá!

Tað er andsøgn at lata sjálvstýri, tá stevnan er sjávstýri! Fiskirættindi- og grunnar telja nógv fyri flestu føroyingar. Tilfeingið er ogn Fólksins. Men eisini aðrar sera góðar grundir eru til ES-varsemi. Katolikkarnir eru í stórum meiriluta í ES! Leksikon 2000 sigur, at 400 mió. katolikkar búgva í Suður- og Eysturevropa. Flestir í ES. Fólkakirkjan er viðfángingur av 70 mió. lutheranum heimsins – flestir í USA, N-týsklandi, Bretlandi og Skandinavia. Í ES eru færri enn 50 mió. ES er yvir 80% katólskt! Tyngdipunktið liggur í Vatikanium, í Róm, har „Vicarius Christi" residerer. Elligamla skipanin fast altíð við langsiktaðan politikk. Og jesuittanna universitetir í USA undirstrika stóra virksemið. At loyndarfullar skipanir ganga á odda fyri pávan, undrar neyvan nakran søgufróðan.

Tony Blair konverteraði til katolikk beint komin út úr Downing Street. Og í gjár hoyrdist, at hann vil verða ES-forseti, og Fogh eisini. Her sampakkar næstan alt ov væl! Man trúarskiftið Blair´s hava verið rein opportunisma fyri atkvøður? Tað kann eingin fortonkja mær at meta! Aðrir felagsnevnarar ímillum Anders Fogh Rasmussen og Tony Blair eru so eisini teirra eltan av George Bush í kríggj. Um Anders Fogh gerst ES-forseti, kann kristna boðanarfrælsið væntast bannað. Hann vil hava allan átrúna úr almenna rúminum. Tað segdi hann aftaná Muhammed-kreppuna! Men sum Skriftin sigur: "Tú skal lýða Guði meira enn monnum!" Í kvøld las eg at Fogh er bodin vitja Bush í Texas.

Um Anders fær forsetan – vænta vit, at Edmund gerst nýggjur danskur státsministari. Og er hann tá í samgongu vid Høgna her heima, ja so fer nógv at liggja betur fyri? Tad er eisini tankavekjandi, at tá ið Páll pávi lá lit´de´prade, tá komu fleiri x-præsidentar á knøunum: Jimmy Carter, George Bush, senior og Bill Clinton, saman vid Bush junior, sum knelandi og æradu deyda pávan! Signalvirði!

Veljið ikki úlv í seyðaskinni og andliga blind. Politisk einsporað koyra fegin í Mercedis á Edmund Joensen´sa: »breida vegi út í framtíðina!« Nei, gerid tad ikki! Veljid hin »smala vegin!« Føroyingar vita, at bert við at ganga á teimum smølum rásunum vinnist heilt upp á hægstu tindar.

Fráveljið Róm fyri mammon. Sannroynd er, at allir sáttmálar ES byggja á Rómverjasáttmálan!

Góðan D-dag!

# Rættleiðing til Oyggjatíðindi

Í Oyggjatíðindum tann 9. og 12. januar í ár verður nógv gjørt burturúr rættarmálinum, har ein pensioneraður limur í felagnum í Fuglafirði hevur tapt eitt rættarmál móti Føroya Arbeiðarafelag.

Av tí at nevndi pensioneraði limur og Oyggjatíðindi koma við beinleiðis ósannindum umframt at tey vevja saman hugtøkini **lívstrygging** og **eftirløn**, so síggja vit okkum noydd at koma við hesari rættleiðing.

Vit skulu í hesum sambandi upplýsa:

- At nevndi pensioneraði limur hevur fingið eftirløn sína útgoldna,
- At skattur/avgjald er goldið av nevndu eftirløn,
- At talan er um eina misskiljing, tá Oyggjatíðindi brúkar hugtøkini *lívstrygging* og *eftirløn*, hvørt um annað, tí talan er um hvør sína skipan,
- At tann í Oyggjatíðindum nevndi pensioneraði limur var farin um 67 ára aldur, áðrenn skipanin við lokagjaldinum varð samtykt og kom í gildi,
- At hesin limur sostatt ikki hevur verið verri stillaður enn allir aðrir limir, sum tá vóru fyltir 67 ár,
- At allar kollektivar lívstryggingarskipanir hava eitt aldursmark,
- At hesin sami pensioneraði limur líka frá kollektiva lívstryggingin kom í gildi til hann fall fyri alment galdandi 67 ára aldursmarkinum var fult tryggjaður í sambandi við deyða, alvarsliga sjúku og álvarsliga sjúku hjá møguligum børnum,
- At hesin limur hevur havt fullkomuliga somu rættindi sum hinir limirnir í kollektivu lívstryggingarskipan okkara,
- At allar slíkar skipanir hava ein skeringsdag, tá tryggingarnar verða útbygdar til m.a. at fevna um útgjald av lokagjaldinum,
- At einki grundarlag er fyri illgitingunum hjá Oyggjatíðindunum, um at Føroya Arbeiðarafelag skal hava sloppið sær undan at gjalda skatt,
- At Føroya Arbeiðarafelag teknaði kollektiva lívstrygging hjá felagnum ALKA Forsikring, eftir at Fíggjarmálaráðið í mong ár hevði góðtikið, at fleiri starvsbólkar hjá tí almenna høvdu sínar eftirlønar- og lívstryggingarskipanir í donskum tryggingar- og eftirlønarfeløgum,
- At Fíggjarmálaráðið í nógv ár hevur, og framhaldandi flytir stórar upphæddir sum tryggingargjøld til donsk tryggingar- og eftirlønarfeløg,
- At Føroya Arbeiðarafelag valdi at tekna kollektivu lívstryggingarnar fyri limir sínar har felagið fekk bestu treytirnar,
- At einki grundarlag er fyri teimum illgitingum, sum Oyggjatíðindi eru komin við.

Vit harmast um at Oyggjatíðindi skal breiða út slíkar illgitingar, sum als einki grundarlag er fyri, og vit undrast á, at blaðið ikki tykist at hava skilt munin millum eftirløn og lívstrygging.

*Tórshavn,*
*tann 17. januar 2008*
**Føroya Arbeiðarafelag**